

## Ivi um kapping

Vinnuhúsið hevur ikki góðar vónir um, at nakað munagott fer at spyrjast burtur úr tí nýggja uppskotinum til elveitingarlóg. Á heimasíðuni skrivar Vinnuhúsið, at tað kann hugsast, at fáir ella kanska eingin nýggjur framleiðari verður á marknaðinum uttan teir, sum longu eru. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur sagt, at tað er ikki meiningin við lógini. Hann vísir millum annað á, at øll vindorkuútbygging skal bjóðast út í framtíðini.

## Javna-Cruise

Felagið Javni og Smyril Line bjóða nú fólki við menningartarni, avvarðandi og teimum, sum starvast innan økið, á Javna-Cruise til Seyðisfjarðar við Norrønu. Farið verður úr Føroyum 14. mai, og ferðalagið kemur heimaftur 17. mai. Í Íslandi verður skipað fyri útferðum, og umborð á Norrønu verður undirhald við sangi, tónleiki og øðrum. Tey, sum ætla sær til Íslands við Norrønu á Javna-Cruise, skulu siga Javna frá á telefon 314827.



*Grækaris A. Joensen (vinstrumegin) hevur lagt fram eina ætlan um menning av heimbygdini. Borgarstjórin, Boje Christensen (høgrumegin) tekur væl ímóti henni. Tó eru nógvir lutir, sum teir mugu tosa nærri saman um*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Ein spennandi ætlan fyri Kvívík

**Hósdagin í farnu viku legði byggimeistarin Grækaris A. Joensen fram stóru byggiætlan sína fyri bygdaráðnum í Kvívík.**
**– Vit vóru øll samd um, at talan var um eina sera positiva ætlan, sigur borgarstjórin, Boje Christensen**

MENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kvívík:** Grækaris A. Joensen hevur í eina tíð arbeitt við eini ætlan um, hvussu hann kann verða við til at menna heimbygdina.

Hósdagin legði hann fram eina heildarætlan fyri eitt øki ovarlaga í bygdini, har ætlanin er at hava íalt 42 bústaðareindir.

Hesi verða skipað sum randarhús, lyklaklár sethús og sum planerað grundøki á økinum tey nevna Frammi í Gerði.

Hetta er náttúruvakurt øki báðumegin ánna, ið rennur gjøgnum bygdina. Haraftrat fáa fólkini eitt sera gott útsýni yvir bygdina og suðureftir móti Kolturi og Hesti.

Bygdaráðið varð kunnað um ætlanina á fundinum í farnu viku, og skal málið nú á ein komandi bygdaráðsfund.

– Hetta er ikki ein ætlan, ið ein bara samtykkir soleiðis ein fyrrapart, sum borgarstjórin tekur til.

Næsti bygdaráðsfundur verður hálvan apríl, og tá kemur hetta forvitnisliga byggimálið uttan iva á skránna. Eftir fundin er ætlanin at geva Grækarisi eitt svar.

– Okkara fyrsta reaksjón var í øllum førum sera positiv, sigur Boje.

### Býarplanur

Bygdaráðið í Kvívík arbeiður í hesum døgum við at gera bygdarplanin lidnan. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis.

Í hesum plani lá – eins og í ætlanini hjá Grækarisi – eisini ein ætlan um eina komandi bygging av barnagarði í bygdini.

Prosjekteringin av barnagarðinum er longu farin í gongd, so her má einhvør loysn finnast.

Sambært ætlanini hjá Grækarisi A. Joensen var møguleiki at byggja barnagarðin soleiðis, at einfalt var at byggja hann út, um tað einaferð skuldi verðið neyðugt.

### Spyrja eftir grundøkjum

Sjálvur dámar Boje væl ætlanina um kombinasjónina av bústaðareindum.

Hetta ger hann ikki minst tí, at gongdin er hon at fleiri fólk ynskja at búseta seg aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum. Og her liggur Kvívík ikki langt av leið í so máta.

– Vit hava merkt ein øktan eftirspurning eftir grundøkjum her í kommununi, upplýsir borgarstjórin.

Tá bygdarplanurin er samtyktur, verða í øllum førum fleiri grundøki at fáa í Leynum.

### 42 eindir

Ætlanin hjá Grækarisi A. Joensen og fyritøku hansara G.A.J. Smíð er at gera eina útstykking við 42 bústaðareindum í eini heildarætlan.

Grækaris sjálvur er greiður um, at mong vilja byggja síni egnu hús. Tí verður ein partur av útstykkingini løgd út sum byggibúgvin grundøkir.

Sjálvt økið liggur oman fyri skúlan, báðumegin Stórá sum rennur gjøgnum bygdina. Ætlanin miðar eftir at gera 15 øki á vestaru síðu byggibúgvin, har keyparin sjálvur kann gera tey liðug, meðan restin av økjunum verða bygd liðug.

Í sambandi við ætlanina verður neyðugt at gera eina betongella stálbrúgv tvørtur um ánna. Ætlanin er, at henda brúgvin skal verða vøkur á at líta.